Privatiseringarnar:

# Fyrst Atlantsflog – síðani Lív

PRIVATISERING
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Ætlanin er at privatisera partar av fleiri almennum fyritøkum í 2006. Politiska viðgerðin í landsstýrinum av privatiseringini byrjar í næstum. Tá fara samgonguflokkarnir sum tað fyrsta málið í privatiseringstilgongdini at viðgera Atlantsflog. Hetta upplýsti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í tinginum fríggjamorgunin. Ætlanin er at lýsa part av flogfelagnum til sølu í næsta ársfjórðingi í 2006. Eisini politiska viðgerðin av tryggingarfelagnum Lív verður tikin upp í næstum, helst um aldarskiftið segði landsstýrismaðurin. Her er ætlanin at selja 50%.

Triðja almenna felagið, sum verður privatiserað, er Føroya Tele. Næstu vikurnar fer landsstýrið at fáa uppskot um, hvørja leið man fer at velja á hesum økinum. Politiska viðgerðin av Føroya Tele verður eftir ársskiftið. Ætlanin er, at politiska viðgerðin í samgonguni av hesum trimum almennu stovnum skal vera liðug, soleiðis at málini kunnu leggjast fyri tingið áðrenn seinasta framløgudag 5. mars.

Um Føroya Tele segði landsstýrismaðurin annars, at landsstýrið hevur enn ikki tikið endaliga støðu, hvussu privatiseringin skal fara fram og her verður so serliga hugsað um netið. Hann vísti tó á, at ætlanin er at privatisera raksturin av Føroya Tele tvs. at selja allan tann partin av fyritøkuni, sum landsstýrið ætlar sær at sleppa av við í einum. – Letur tað almenna netið frá sær, so kann tað koma hartil, at tað uppá sikt verður neyðugt hjá landinum at fáa sær egið net aftur.

Um privatiseringarnar sum heild segði Bjarni Djurholm, at almennu fyritøkurnar verða antin seldar lutvíst ella samlað.

## Atlants Kolvetni liðugt at bora

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni hevur seinastu tríggjar vikurnar verið við í eini oljuboring í Írska havinum saman við fleiri øðrum oljufeløgum. Talan er um ein avmarkingarbrunn á oljufeltinum West Lennox, sum liggur í eystara partinum av írska havinum. Sett varð á at bora 18. september og er boringin júst endað. Hon er gjørd upp sum eitt "tight hole" tvs. at enn verða upplýsingar ikki latnir út til almenningin. Atlants Kolvetni, sum herfyri keypti seg inn í West Lennox, eigur 25% av loyvinum. Boringin verður gjørd fyri at finna fram til, hvussu stór ein komandi framleiðsla kann blíva. Tað er Challenger Minerals, sum er fyristøðufelag. Ætlanin er nú at kanna eitt annað spennandi øki í grannalagnum, sum verður kallað Crosby verður upplýst í skrivi frá Atlants Kolvetni.

## Øssur í Fríðriksvág

LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Mánadagin letur Øssur Johannesen upp framsýning í Gallarí Fríðriksvág í Vágsbotni og sama dag gevur út sína 5. fløgu.

Mánadagin letur listamaðurin Øssur Johannesen upp framsýning í Gallarí Fríðriksvág í Vágsbotni í Havn. Talan er um málningar, sum vit kenna teir frá honum. Daprar expressionistiskar menniskjalýsingar. Fleiri stórir málningar eru á sýningini. Framsýningin er opin frá mánadegnum 10. oktober til 30. oktober og opið er frá klokkan 16 til 17:30.

### Fløga

Sama dag gevur Øssur út sína 5. fløgu. Hann spælir sjálvur øll ljóðførini; bass, akk. guitar, trummur og el-guitar. Har er okkurt við indiskum íblástri, men annars bæði stilt og vilt. Fløguna hevur Kartni Fornagarð tikið upp uppá 3 tímar inni hjá Øssuri og Jón McBirnie hevur ljóðblandað.



*Kristian Davidsen, strandferðslustjóri, vindur føroyska flaggið á stong á nýggja Smyrli á fyrsta sinni, eftir at skipið varð yvirtikið. Móttøka verður á Drelnesi næsta leygardag*

# Nýggi Smyril fær tey kongligu at blikna

**Tá ið nýggi Smyril stevnir inn á Tvøroyri leygardagin 15. oktober, fer hann at fáa eina hjartaligari móttøku enn nakar kongligur hevur fingið í Suðuroy**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið nýggi Smyril stevnir inn á Tvøroyri leygardagin 15. oktober, fer hann at fáa eina móttøku, sum aldrin er sædd fyrr um okkara leiðir - í hvussu so er í Suðuroy.

Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur og fyrireika eina móttøku, sum fer at fáa allar kongligar móttøkur at blikna og sum fer annars at siga spaðar frúgv til til øll onnur tiltøk av hesum slagi í Suðuroy.

Hendan móttøka kemur so afturat teirri formligu móttøkuni, sum Strandferðslan skipar fyri á Tvøroyri.

- Nýggi Smyril er størsta framstig í Suðuroyarsøgu í eitt mannaminni og tí haldi vit eisini, at hann hevur uppiborðið eina heilt serliga móttøku, sigur Søren Lünell Bruhn, sum er við til at samskipað móttøkuna.

### Fólksins móttøka

Tann móttøka, sum arbeiðsbólkurin fyrireikar, verður av sonnum ein fólksins móttøka.

- Móttøkan verður eitt felags-projekt fyri alla Suðuroynna, úr norði í suður, úr vestri í eystur, samstundis sum at ítróttarfeløg, musikkskúlin og mong onnur kýta seg fyri at hetta til ein veitsludag uttan samanbering í Suðuroy, leggur hann afturat.

Tilsamans fer móttøkan at kosta einar 300.000 krónur og fyri at fíggja tiltakið, hava bæði vinnulív og kommunurnar í Suðuroy stuðlatiltakinum. Tilsamans lata kommunurnar 150.000 krónurí stuðuli til tiltakið og tað er 30 krónum fyri hvørt fólk í kommununum.

Samstundis hevur Strandferðslan játtað 50.000 krónur til fýrverk, sum ætlanin er at skjóta um kvøldið.

Tilsamans vænta fyrireikararnir, at eini 3000 fólk fara at verða við til at bjóða nýggja Smyrli vælkomnum.

Eftir tí, sum nú liggur í kortunum, stevnir Smyril inn á Tvøroyri leygardagin 15. oktober klokkan 13.

Samstundis kemur Smyril 1 úr Havnini og teir báðir skulu so fylgjast inn eftir fjørðinum.

### Bæði úti og inni

Annars er ætlanin, at bæði gamla sluppin Johanna, grindabátarnir í Vági, kappróðrarbátar og ivaleyst eisini aðrir bátar við, skulu út á fjørðin at fylgja Smyrli at bryggju.

Á gomlu samferðsluhavnini á Drelnesi er ætlanin at savna ítróttarfeløg, bindiklubbar og alskyns feløg og felagsskapir klokkan 12.30, sum síðani skulu ganga í skrúðgongu út í nýggju samferðsluhavnina, har Smyril leggur at.

- Vit vóna at tey fara í eyðkennisbúnar og annars vilja gera eitt sindur burturúr, fyri at fáa eina litfagra og sermerkta skrúðgongu.

Á nýggju samferðsluhavnini er so ætlanin at hornorkestur skal spæla. Har er eisini ætlanin at syngja ein nýggjan felagssang, sum NePtuN hevur yrkt til nýggja Smyril.

Har verður annars tann formliga móttøkan hjá Strandferðsluni við røðum og tí, sum annars hartil hoyrir.

Aftaná er ætlanin at fara inn í ítróttarhøllini í Trongisvági.

- Har er ætlanin at savna dastið av tónleikarum í Suðuroy at framføra. Til børnini er ætlanin at hava hoppiborg og annars ymiskt annað undirhald. Samstundis bjóða fyrireikararnir pylsur og sodavatn. Føroyskur dansur og felagssangur er eisini á skránni.

Har er eisini ætlanin at hava ein lítlan røðarapall (Speakers Corner), har ein og kann fáa høvi til at siga sína hugsan um Smyril.

Um kvøldið er so ætlanin at hava stórdans í høllini í Trongisvági.

Søren Lünell Bruhn sigur, at alt tiltakið er ókeypis.

Hann leggur kortini afturat, at enn er ikki alt endaliga fastlagt, so broytingar kunnu verða gjørdar.